| TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ<br>29. juni 2006 | Blað nr.: **6633**<br>Formansins merki: |
|---|---|

# GERÐABÓK

**Dato:** **29. juni 2006**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr:** **116/06-133/06**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Jógvan Arge
Leivur Hansen
Hildur Eyðunsdóttir
Marin Katrina Frýdal
Katrin Dahl Jakobsen
Elin Lindenskov
Annika Olsen
Bjarti Mohr
Beate L. Samuelsen
Sjúrður Olsen
Høgni Mikkelsen
Jan Christiansen
Heðin Mortensen

**LUTTÓK IKKI:**

**LUTTÓK EISINI:**

**SKRIVARI:**
Jens M. Poulsen

**PROTOKOLLFØRARI:**
Heri Olsen

**MÁL FYRI OPNUM HURÐUM, kl. 18.00:**

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagsskránna.**

**120/06** **2006-0221**

**Mál beind í nevndir.**

**Býráðið 29. juni 2006:** Framlagt.

**121/06** **2005-1122**

**Ábøtur á Niels Finsens gøtu frá Vaglinum niðan til Steinatún.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sum partur av støðuga arbeiðnum at halda við líka og bøta um viðurskiftini í miðbýnum og ásannandi, at verandi flísalegging á Niels Finsens gøtu er í ringum standi, hevur umsitingin gjørt uppskot til nýtt snið, tilfar og skipan. J. nr. 2005-1122.

Uppskotið leggur upp til, at ein 1-sporað koyribreyt verður asfaltløgd, endað við trimum røðum av chausses-steinum. Millum koyribreytina og gongubreytina verður skipaður ein geiri, har ljós, beinkir, ruskspannir og skeltir skulu verða. Lagt verður upp til, at flísarnar á gongubreytini verða skiftar til sama slag, sum er á gongubreytunum í miðbýnum annars - betongflísar við chausses-steinum ímillum.

Uppskotið leggur upp til, at gosvatnið á vegamótinum Sverrisgøta/ Niels Finsens gøta verður burturbeint, og tískil skal avgerð takast um, hvørt arbeiðið skal gerast í einum tveimum stigum.

Um so er, at avgjørt verður at gera arbeiðið í stigum, kann 1. partur vera at leggja asfalt, chausses-steinarnar og seta upp nýggjar lampur og beinkir tveimum teinum - av Vaglinum niðan til gosvatnið og frá gosvatninum niðan í Steinatún. Sí kortskjal 1. stig.

2. partur kann so vera at skifta flísarnar á gongubreytunum og at beina gosvatnið burtur. Sí kortskjal 2. stig. nr. 2005-1122.

Ætlanin er at byrja arbeiðið sum skjótast.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at nevndin góðkennir uppskotið og beinir málið í býráðið um teknisku nevnd.

Somuleiðis mælir býararkitekturin til, at nevndin beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina í samband við at játta kr. 900.000 til endamálið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 6. mai 2005:** Nevndin samtykti at heita á umsitingina at arbeiða víðari við málinum at leggja fyri aftur á næsta fundi.

**Ískoyti:**
Umsitinging hevur gjørt eitt nýtt uppskot. Í staðin fyri asfalt verða brúgvasteinar nýtt sum belegning.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2005:** Samtykt at taka undir við nýggja tilmælinum og at kunna grannarnar í góðari tíð.

**Ískoyti:**
Umsitinging hevur saman við HMP consult gjørt útbjóðingartilfar. Mett verður, at samlaði kostnaðurin verður 1.568.100 kr. íroknað mvg.

Mælt verður til at góðtaka uppskotið og at mæla fíggjarnevndini til at játta peningin umvegis teknisku nevnd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. september 2005:** Ein meiriluti, Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Leivur Hansen og Sjúrður Olsen, tekur undir við uppskotinum og beinir málið í teknisku nevnd.

Somuleiðis samtykti meirilutin at beina málið í fíggjarnevndina í sambandi við fíggjan av konto fríðkan av býnum 2005/2006 og at hava kunnandi fund við grannarnar.

Ein minniluti, Jan Christiansen, mælir til, at kunnandi fundur verður við grannarnar, áðrenn málið verður viðgjørt í fíggjarnevndini.

**Fíggjarnevndin 28. september 2005:** Umsitingin hevur havt kunnandi fund við grannarnar tann 28. september 2005.

Samtykt at mæla býránum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og játta kr. 1.568.000 av íløgum.

**Býráðið 6. oktober 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Tekniska nevnd 20. oktober 2005:** Málið framlagt.

**Ískoyti:**
2 virki vóru boðin at geva undirhondsboð uppá álegging av brúgvarsteinum í Niels Finsensgøta, og hevur umsitingin móttikið hesi tilboð:

| | |
|---|---|
| J & K Petersen | 3.633.592 kr. |
| Articon | 1.893.750 kr. |

**Tilmæli.**
Býararkitekturin mælir til at byrja samráðingar við Articon um gerð av arbeiðinum.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2005:** Samtykt at taka upp samráðingar við Articon.

**Fíggjarnevndin 15. desember 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka av tilboðnum hjá Articon og at játta kr. 1.600.000,00 av íløgum.

**Býráðið 15. desember 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Tilboðið hjá Articon ljóðaði upp á 1.893.750 kr. uttan mvg, svarandi til 2.012.109 kr. við 6,25% mvg. Játtað var 1.600.000 kr. Til liðugtgerð av arbeiðið vantar solstatt 412.109 kr.

**Tilmæli:**
Býararkitektin mælir til at játta 412.109 kr. til liðugtgerð av belegning á Niels Finsengøtu.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 1. mai 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum, og at peningurin verður nýttur av konto fyri fríðkan av býnum.

**Ískoyti:**
Koyribreytin í Niels Finsensgøtu er nú skift út, og sambært upprunaligu ætlanini verður næsta stig at skifta belegning á gongubreytini og uppseting av nýggjum lampum frá Steinatúni og oman til Gamla Bókhandil. Umsitingin hevur gjørt kostnaðarmeting.

| | |
|---|---|
| Stig 1. Býráðssalurin – Káta Hornið | 348.000 kr. |
| Stig 2. Føroya Banki – Kondittarríið | 290.000 kr. |
| Stig 3. Býráðssalurin – Mylnugøta | 390.000 kr. |

| | |
|---|---|
| Pláss 1. Springvatnið – Ebenezer | 340.000 kr. |
| Pláss 2. Innkoyring við Steinatún | 270.000 kr. |

| | |
|---|---|
| 21 stk. Lampur v. uppseting | 379.500 kr. |
| Projektering, óvantað og mvg. | 524.550 kr. |
| | |
| Samlaði kostnaðin eru mett til | 2.700.928 kr. |

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at nevndin tekur við ætlanini at arbeiða víðari at liðugtgera Niels Finssensgøtu, og at nevndin heitir á býráðið umvegis fíggjarnevndina at játta pening á konto "fríðkan av býnum".

Býararkitektin mælir til at taka undir við uppskotinum og at gera teinar 1,2 og lampur á hesum teinunum til samlaðan kostnað við projektering/eftirlit, óvæntað og mvg upp á tilsamans 1.542.050 kr. Peningurin til hetta arbeiðið skal fíggjast av konto fyri fríðkan av býnum, soleiðis at ætlaðar íløgur á hesari kontoini vera raðfestar á henda hátt:

| **Fríðkan av býnum** | **2005** | **2006** | **2007** |
|---|---|---|---|
| Økið til Müllers pakkhús | 800 | 0 | |
| N. Finsensgøta, ábøtur | 500 | 1.800 | |
| N. Finsensgøta, ábøtur gongubreyt | 0 | 1.200 | 400 |
| Vaglið | 0 | 0 | |
| Tinghúsvegur | 400 | 0 | |
| Tinghúsvegur ognir hjá TK | | 200 | |
| Sverrisgøta/ Dr. Jacobsensgøta, ábøtur | | 0 | |
| Síðuvegir, atkoma, gøtur o.a. | 100 | 300 | |
| Kirkjugarðurin á Svínaryggi | 100 | 200 | |
| Onnur fríðkan | | | |
| Steinatún | | | |
| | | | |
| **Fríðkan av býnum** | **1.900** | **3.700** | |

Hetta merkir, at játtast skulu 1.2 mill. kr. av íløgunum fyri fríðkan av býnum fyri 2006, og at játtast skulu 400 túsind kr. av íløgunum fyri 2007.

Somuleiðis mælir býararkitekturin til, at nevndin tekur undir við at arbeiðast skal eftir uppskotinum um heildarloysn fyri Niels Finsens gøtu frá Vaglinum niðan til Steinatún, soleiðis at málið kann sendast til teknisku nevnd til ummælis.

Til hetta málið var Michael Jacobæus, lendisarkitektur, og greiddi frá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 12. juni 2006**: Nevndin samtykti at mæla býráðnum um fíggjarnevndina til at marka 1,2 mió kr. av íløgum í 2006 og 400.000,00 kr. í 2007 til ábøtur á N. Finsensgøtu.

Eisini samtykti nevndin, at umsitingin hevur kunnandi fund við handlarnar fram við gøtuni um ætlaðu heildarloysnina frá Vaglinum niðan til Steinatún.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2006:** Ein meiriluti, Jógvan Arge, Leivur Hansen og Heðin Mortensen, mælir býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

Ein minniluti, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen, tekur støðu á býráðsfundinum.

**Býráðið 29. juni 2006:** Einmælt samtykt.

122/06 **2006-1754**

**Høvuðsprojekt: Nevndarsamtykt - Sambindingarvegur Klingran – Løgmannabreyt við íbinding í Landsveg**

Umsitingin hevur, saman við ráðgeva, gjørt eina samlaða kostnaðarmeting álj. kr. 26.800.000,00 (sí skjal nr. 2006-1750/1) av øllum arbeiðinum at gera sambindingarveg millum Klingruna og Løgmannabreyt við rundkoyring á vegamótinum við Løgmannabreyt og yvir um komandi atkomuveg til Havnar, tó uttan gerð av planskyldari íbinding í komandi landsveg.

Kostnaður fyri projektering, útbjóðing og eftirlit er kr. 900.000,00.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir teknisku nevnd, umvegis figgjarnevndina og býráðið, til at játta kr. 900.000,00 til projektering, útbjóðing og eftirlit fíggjað av íløgum fyri vegir í 2006.

**Tekniska nevnd 1. juni 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum.

**Ískoyti.**
Fíggjarnevndin skal taka støðu til samtyktina í teknisku nevnd frá 1. juni 2006 um at játta kr. 900.000,00 til projektering, útbjóðing og eftirlit fíggjað av íløgum fyri vegir í 2006 sambært galdandi reglur um mannagongd um verkætlanir, sum skulu fíggjast av konto fyr íløgur.

Fíggjarnevndin skal viðgera uppskot til figging og til- ella frámæla.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2006:** Býarverkfrøðingurin greiddi frá málinum.

Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd, soleiðis at arbeiðið kann bjóðast út innan summarfrítíðina og at byrjað verður í september.

**Býráðið 29. juni 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**123/06** **<u>2006-1840</u>**

**<u>Kommunala Brennistøðin: Broyting av galdi fyri jarnburturkasti</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Tann 1. januar 2006 vórðu gjøldini fyri flestu burturkastsløgini hækkað.

Gjaldið fyri jarnburturkast varð ikki broytt, tí við at hava tað gjaldið lægri enn gjaldið fyri brennbart burturkast varð væntað, at meiri jarn fór at verða skilt frá vanliga burturkastinum, ið kemur inn í bingjum. Men nú kann staðfestast, at hesin prísmunur hevur munað ov lítið, tí framvegis er alt ov nógv av jarni í vanliga burturkastinum, ið kemur í bingjum frá virkjum.

Nú ovnurin er umbygdur við m.a. nýggjari rist og øskuflutningsskipan, er týdningarmikið at minka mest møguligt um innihaldið av jarni í burturkastinum. Hetta fyri at verja ovnin mekaniskt og fyri at minka um stopp-tíð, ið skal nýtast til at fáa jarn burtur, sum hevur sett seg fast.

KB hevur eisini ætlanir um at gera íløgu í ein knúsara (affaldsneddeler), og tá er rættiliga umráðandi, at sum minst av jarni er í burturkastinum, so jarnið ikki setur seg fast í knúsaranum ella brýtur knúsaran.

Umhvørvisliga sæð er eisini best, um jarn ikki verður brent og síðan tyrvt, men heldur verður fingið burtur úr brennbara burturkastinum og endurnýtt.

Ein háttur at fáa meiri jarn skilt frá øðrum burturkasti, er at hava ein størri mun á gjaldinum, so tað veruliga ger mun at skilja jarni frá øðrum burturkasti. Fyri at fáa ein veruligan mun, má gjaldið setast niður til 0 kr., tí gjaldið á øðrum burturkasti er á hóskandi støði.

Sæð út frá einum fíggjarligum sjónarmiði er tað forsvarligt at lækka prísin á jarni niður á 0, tí marknaðarprísurin á jarnskrotti hevur verið hampiliga góður seinastu árini, og tí vil handfaringin ikki geva hall, sjálvt um gjaldið verður sett til 0.

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyri standandi lýsing mælir býarverkfrøðingurin og leiðarin á Kommunalu Brennistøðini til:

at gjaldið fyri móttøku av jarnburturkasti verður sett til 0 kr.
at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina til góðkenningar.
at broytta gjaldið verður sent landsstýrinum til góðkenningar.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 8. juni 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá leiðaranum á kommunalu brennistøðini og býarverkfrøðinginum.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2006:** Leiðarin fyri kommunalu brennistøðina og býarverkfrøðingurin greiddu frá málinum.

Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini.

**Býráðið 29. juni 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**124/06** **2006-1758**

**Kommunala Brennistøðin: Handfaring av roykburturkasti (restprodukter) / goymsla av nýtsluevnum (kálki)**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Til nýggju roykreinsiskipanina skal nýtast hjálpievni, sum eru kálk og aktivt kol. Burtur úr reinsingini stendst avlopsevni (restprodukt), ið skal sendast av landinum at tyrvast á serliga góðkendum støðum.

| | Kg/tíma | Tons/ár (8000 tímar/ár) |
|---|---|---|
| Kálk | 28 | 224 |
| Kol | 0,8 | 6,4 |
| Avlopsevni | 59 | 472 |

Kommunala Brennistøðin hevur saman við IRF og Rambøll kannað, hvussu logistikkurin kann skipast á besta og bíligasta hátt.

Í hesum sambandi er handfaringin av avlopsevnum boðin út millum viðurkendar veitarar, umframt at tilboð uppá flutning av kálki og avlopsevnum eru fingin frá veitarum á føroyska marknaðinum. Ymisk modellir eru sett upp, soleiðis at bíligasta loysnin kundi veljast.

Niðurstøðan av kanningunum er, at bíligasta og tryggasta loysnin er at hava eitt (felags) lagur í Føroyum við kálki og til avlopsevni, í mun til at inn- og útflyta ávíkavist kálk og avlopsevni so hvørt í bingjum.

Í hesum sambandi hava IRF og Brennistøðin umrøtt, hvørjir møguleikar eru fyri at hava eitt felags lagur til hetta. Lagrið skal helst vera ein stór høll, umleið 1.000 m², og skal helst liggja onkustaðni mitt millum báðar brennistøðirnar, fyri at flutningurin til og frá brennistøðunum skal vera so eins sum gjørligt. Harumframt er best, um lagrið er á ella við eini bryggju, ið skip kann leggja til, harvið verður flutningurin millum skip og lagur so lítil sum gjørligt.

IRF og KB hava í boði at leiga ein part av eini vælegnaðari høll, ið lýkur kravfestingina, til endamálið fyri ein sámuligan kostnað. Ætlanin er at IRF leigar høllina og stendur fyri rakstrinum, og síðan leigar KB helvtina av plássinum aftur frá IRF.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin og leiðarin á Kommunalu Brennistøðini mæla til, at loysnin við einum lagri í Føroyum verður vald, og at KB leigar ein part av umrøddu høll saman við IRF.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 8. juni 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá leiðaranum á kommunalu brennistøðini og býarverkfrøðinginum og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2006:** Leiðarin fyri kommunalu brennistøðina og býarverk-frøðingurin greiddu frá málinum.

Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini.

**Býráðið 29. juni 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**125/06** **<u>2006-0527</u>**

**<u>Reglugerð fyri tøming av rottanga og spillvatnsreinsiverki í Tórshavnar kommunu</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í sambandi við § 2 í kunngerð nr. 186 frá 5. november 1993 skal kommunustýrið gera eina ætlan fyri tøming og burturbeining av spillvatnsevju í kommununi herundir ásetingar um hvussu ofta tømt verður. Við støði í m.a. hesi grein hevur kommunan gjørt

eitt uppskot til eina reglugerð fyri tøming av rottangum og spillvatnsreinsiverkum í Tórshavnar kommuna.

Støða skal verða tikin til, um heilsu- og umhvørvisnevndin kann samtykkja uppskotið til reglugerðina.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til, at heilsu- og umhvørvisnevndin samtykkir uppskotið til reglugerðina.

Fyrisitingin hevur gjørt eitt uppskot um hvussu gjaldast skal fyri tøming av rottangum og spillvatnsreinsiverkum.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til, at heilsu- og umhvørvisnevndin samtykkir uppskotið til áseting av reglum fyri gjalding og prís fyri tøming.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 10. mai 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum.

Umsitingin leggur endaligt uppskot til reglugerð fyri nevndina aftur á næsta fundi.

**Ískoyti:**
Støða skal verða tikin til, um heilsu- og umhvørvisnevndin kann samtykkja uppskotið til reglugerðina og beina tað til endaliga viðgerð í býráðnum umvegis fíggjarnevndina.

Støða skal samstundis verða tikin til, um heilsu- og umhvørvisnevndin kann samtykkja tað fyrisitingarliga uppskotið til hvussu gjaldast skal fyri tøming av rottangum og spillvatnsreinsiverkum.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til, at heilsu- og umhvørvisnevndin samtykkir uppskotið til reglugerðina og uppskotið til áseting av reglum fyri gjalding og prís fyri tøming, soleiðis at tað samlaða málið kann beinast víðari til endaliga viðgerð í býráðnum.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 8. juni 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2006:** Leiðarin fyri kommunalu brennistøðina og býarverkfrøðingurin greiddu frá málinum.

Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini.

**Býráðið 29. juni 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**126/06** **2006-1844**

**Uppskot til broyting av Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu viðv. ásetingum fyri B8-vinnuøki á Skarðshjalla**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Í sambandi við at TK fyrireikar 2. og 3. byggistig av útstykkingini av B8 vinnuøkinum á Skarðshjalla, hevur ognarumsitingin sett fram fyrispurning um at fáa broytt ásetingina um byggistig og møguliga eisini fyri rúmmál fyri B8-vinnuøki.

Ásetingar fyri B8-vinnuøki:

**§ 15. Ásetingar fyri umráðispart B8 í 3. grundumráði**

1. *Loyvt er einans at byggja hús til vinnuvirki, herundir umsitingar- og tænastuvirki, verksmiðjur, goymslur og tílíkt og til tænastuvirksemi, ið hevur samband við hesi.*

2. *Byggingin skal verða sett samsvarandi heildarætlan fyri alt økið ella fyri hóskiligar partar av økinum.*

3. *Byggistigið má ikki fara upp um 0,4.*

4. *Rúmmálið á húsunum má ikki fara upp um 2,5 m³ fyri hvønn m² av grundstykkinum.*

5. *Eingin partur av útveggi ella tekju má verða hægri enn 13 m, tó kunnu neyðugir tekniskir húsalutir verða hægri eftir nærri góðkenning býráðsins.*

Grundgevingin fyri ynskinum um eitt hægri byggistig er, at byggilendið á Hjalla er avmarkað, og fleiri av teimum, ið søkja um vinnustykki, eru størri vinnuvirki, sum hava útbygt nógv tey seinastu árini og hava nú nátt markið fyri víðkan. Hesi virki ynskja nú at flyta niðan á Skarðshjalla og vilja hava lutfalsliga stór stykki, har pláss er fyri víðking av virkseminum nøkur ár fram í tíðina.

Við at hækka byggistigið upp til t.d. 0,5 verður tað møguligt at nøkta tørvin hjá fleiri vinnuvirkjum.

Um hugt verður eftir øllum B-vinnuøkjunum í Tórshavn, síggja vit, at tey allar flestu loyva einum byggistigi upp á 0,5, og fleiri loyva einum rúmmálið upp á 3 $m^3/m^2$ ella hava onga avmarking í rúmd.

| Øki | Byggistig | Rúmmálið á húsi | Mest loyvda hædd |
|---|---|---|---|
| **B1** | 0,5 | Eingin áseting | eingin áseting |
| **B2** | 0,5 | Eingin áseting | eingin áseting |
| **B3** | 0,5 | 2 $m^3/m^2$ | 9 m |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **B4** | 0,5 | 3 m³/m² | 10 m |
| **B5** | 0,5 | 3 m³/m² | 12 m |
| **B6** | 0,5 | Eingin áseting | 8 m |
| **B7** | 0,4 | 2,5 m³/m² | 13 m |
| **B8** | 0,4 | 2,5 m³/m² | 13 m |
| **B9** | 0,5 | Eingin áseting | ymiskt |
| **B10** | 0,4 | Eingin áseting | 10 m |

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at ásetingarnar fyri B8 vinnuøki verða broyttar, soleiðis at byggistigið verður 0,5, og rúmmálið á húsunum má ikki fara upp um 3,0 m³ fyri hvønn m² av grundstykkinum

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 12. juni 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 29. juni 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**127/06** **2005-0511**

**Kanning av tørvinum á eldrabústovnum í Tórshavnar kommunu.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**

Við støði í skrásetingunum hjá Heimarøktini av røktartørvinum hjá tí einstaka brúkaranum gjørdi Almanna- og heilsumálastýrið í 2005 eina kanning av tørvinum á ellis- og røktarheimsplássum.

Kanningin vísti, at tá Heimið við Vallalíð og nýggja røktarheimið við Hoyvíkstjørn vóru tikin í nýtslu, vildi tørvurin í Suðurstreymi vera:

16 røktarheimspláss
29 ellisheimspláss
4 pláss til minnisveik
3 sambýlispláss

Tilsamans er sostatt tørvur á 52 plássum

Eftir tilmæli frá trivnaðarstjóranum og sosialdeildarleiðaranum samtykti sosiala nevnd tann 7. juni 2005, at farið varð undir fyrireikingar at byggja nýtt ellis- og røktarheim at

nøkta tørvin á eldrabústøðum, og at játtaðar vóru kr. 100.000,00 av konto 40-3197 (Tiltøk á eldraøkinum) til gerð av byggiskrá.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd.

**Býráðið 23. juni 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Stovnsleiðararnir á verandi eldrabústovnum í kommununi hava latið gjørt eina nýggja kanning av tørvinum.

Sambært hesi kanning er tørvurin, eftir at nýggja røktarheimið við Hoyvíkstjørn er tikið í nýtslu:

21 røktarheimspláss
38 ellisheims- og ella sambýlispláss
26 pláss til minnisveik
9 pláss til brúkarar við serligum tørvi (psykiatriskt røktarheim)

Samlaði tørvurin er sostatt 94 pláss.

Hóast nakrir av hesum brúkarum ikki beinleiðis hava ein bráfeingis tørv, so er eingin ivi um, at tørvurin á ellis- og røktarheimsplássum í kommununi framvegis er stórur.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og sosialdeildarleiðarin mælir til, at nevnd verður sett at fyrireika arbeiðið at byggja nýtt ellis- og røktarheim á trøðni, sum kommunan ognaði sær Yviri við Strond, og at 500.000 kr. verða játtaðar av íløgunum á eldraøkinum til endamálið.

**Sosiala nevndin 11. apríl 1006:** Nevndin samtykti at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, at játta kr. 500.000,00 av íløgum á eldraøkinum til gerð av byggiskrá til ellis- og røktarheim Yviri við Strond og at seta bygginevnd.

Nevndin samtykti eisini at heita á byggi- og býarskipanarnevndina um at broyta byggisamtyktina fyri økið, so tað kann brúkast til omanfyri nevnda endamál.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd.

**Ískoyti:**
Økið, ið talan er um, liggur sum A1 øki í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Økið er eisini umfata av serstøku byggisamtykt nr. 7. Her liggur tað sum A2-øki

Sambært Gr. 2 í serstøku byggisamtykt nr. 7, skulu eindirnar A1 og A2, ikki verða nýttar til annað enn sethús. Á hvørjari ogn mugu einans verða bygd eini stakhús, við í mesta lagi tveimum ibúðum.

Sosiala nevnd heitir á byggi- og býarskipanarnevndina um, at ásetingarnar fyri hetta øki verða broyttar til E (øki til alment endamál) í serstøku byggisamtyktini.

Aðrir almennir stovnar liggja innanfyri serstøku byggisamtykt nr. 7. T.d. liggja Lágargarður og Tjarnagarður í E-økinum, Adventistaskúlin liggur í C3-øki og Eysturskúlin í C2-øki.

29. november 2004 samtykti byggi- og býarskipanarnevndin at endurskoða ella avtakað serstøku byggisamtykt nr. 7. (mál nr. 2004-2762)

**2004-2762**

**Endurskoðan av byggisamtykt nr. 7**

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. november 2004:** Vísandi til at tað hevur verið trupult at umsita serstøku byggisamtyktina nr. 7, samtykti nevndin, at umsitingin kannar eftir, um samtyktin kann broytast ella avtakast, soleiðis at ásetingarnar fyri økið verða greiðari.

Vegna ov lítla arbeiðsorku ella vegna raðfestingar, er hetta arbeiði enn ikki gjørt.

Serstaka byggisamtykt nr. 7 fevnir um eitt sera stórt øki og er nógv meira nágreinilig enn almenna byggisamtyktin. Tí krevur tað eina stóra arbeiðsorku at avtaka ella endurskoða hana.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir til at broyta ásetingarnar í serstøku byggisamtykt nr. 7 fyri matr.nr. 1308 frá at vera A2 øki til stakhús, til at verða øki E til alment endamál. Víst verður til, at kommunan hevur ognað sær økið til alment endamál, og til at økið við hesum ikki hækkar í søluvirði.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 12. juni 2006:** Nevndin samtykti at broyta ásetingarnar fyri matr.nr. 1308 til øki E, alment endamál.

**Býráðið 29. juni 2006:** Atkvøtt var um tilmælið hjá byggi- og býarskipanarnevndini, sum var samtykt við 12 atkvøðum fyri og 0 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen, Elin Lindenskov, Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen og Høgni Mikkelsen.

Jan Christiansen greiddi ikki atkvøðu.

**128/06** **2005-2853**

**Viðvíkjandi sundurbýti av matr. nr. 735, Tórshavn.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
9. september í 1992 søkti eigarin av matr. nr. 735, Tórshavn, Johanna J. Bærentsen, um at býta matr. nr. 735, Tórshavn, í 4 grundstykki, og at byggisamtyktin fyri økið var broytt frá D1 øki (almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál) til A1 sethúsaøki.

Ognin matr. nr. 735, Tórshavn, er 3.088 m² til støddar.

Málið var viðgjørt av byggi- og býarskipanarnevndin tann 12. oktober 1992. Nevndin samtykti at ganga umsóknini á møti at góðkenna broyting í alm. byggisamtyktini og samsv. broyting í serstøku byggisamtykt nr. 3, soleiðis at matr. nr. 735 verður A1-øki (sethúsaøki). Hetta bleiv samtykt av býráðnum tann 29. oktober 1992.

Broytingaruppskotið lág frammi í tíðarskeiðnum 15. mars til og við 2. apríl 1993 og seinasta freist at mótmæla broytingini var 15. juni 1993.

Eitt mótmæli kom frá eigaranum av matr. nr. 724h. Hesin mótmælti, at ein partur av hansara ogn skuldi nýtast til innkoyring til matr. nr. 735.

Síðani er tað hent, at 724h er selt og marknaskifti gjørt, soleiðis at vegur nú er frábýttur av matr. nr. 724h, Tórshavn.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at taka málið uppaftur og arbeiða víðari við málinum um broytingina av byggisamtykt og sundurbýti av ognini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2006:** Meðan hetta mál var viðgjørt, fór Jan Christiansen av fundi.

Nevndin vísir á, at býráðið einmælt hevur samtykt broytingina 29. oktober 1992 og tekur undir við tilmælinum frá býararkitektinum.

**Býráðið 8. juni 2006:** Meðan hetta mál var viðgjørt, fór Jan Christiansen av fundi.

Fyrst var atkvøtt um uppskot frá Marini Katrinu Frýdal um at beina málið aftur í nevnd, sum fall við 6 atkvøðum ímóti og 4 atkvøðum fyri.

Ímóti atkvøddu: Leivur Hansen, Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen og Høgni Mikkelsen.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal og Elin Lindenskov.

Greiddi ikki atkvøðu: Jógvan Arge.

Síðani var atkvøtt um at taka undir við tilmælinum frá býararkitektinum og byggi- og býarskipanarnevndini um at arbeiða víðari við málinum og senda málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina, sum var samtykt við 9 atkvøðum fyri og 1 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Elin Lindenskov, Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen og Høgni Mikkelsen.

Ímóti atkvøddu: Marin Katrina Frýdal, tí at málið var ov illa lýst.

Greiddi ikki atkvøðu: Hildur Eyðunsdóttir, tí at málið var ov illa lýst.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at ganga umsóknini á møti at góðkenna broyting í alm. byggisamtyktini og samsv. broyting í serstøku byggisamtykt nr. 3, soleiðis at matr. nr. 735 verður A1-øki (sethúsaøki). Hetta bleiv samtykt av býráðnum tann 29. oktober 1992.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. juni 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 29. juni 2006:** Meðan hetta mál var viðgjørt, fór Jan Christiansen av fundi.

Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**129/06** <u>**2004-0389**</u>

<u>**Nýtt vatnreinsiverk í Havnardali**</u>

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Orsakað av at býurin veksur og fyri at drýggja um vatnið í Villingardalsbrunninum, er ynski frá teknisku deild at fáa nýtt og størri reinsiverk úti í Havnardali.

17. juni 2004 játtaði fíggjarnevndin kr. 365.000,00 til forkanningar og gerð av byggi-programmi, og er ein internur arbeiðsbólkur, Boði Haraldsson, Michael Jacobæus, Robert Thomassen og Viggo Christiansen, komnir á mál við hesum.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin og deildarleiðarin fyri vatn- & gøtuljósdeildini mæla til at játtaðar verða kr. 400.000,00 av íløgum fyri 2005 til at gera dispositiónsuppskot og forprojekt til nýtt reinsiverk í Havnardali.

**Tekniska nevnd 7. apríl 1005:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum og deildarleiðaranum fyri vatn- & gøtuljósdeildini.

**Fíggjarnevndin 13. apríl 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 21. apríl 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Tekniska nevnd 25. august 2005:** Kunnað var um málið.

**Ískoyti:**
Á fundi í teknisku nevnd 25. august 2005 varð kunnað um málið, og varð serliga tosað um kostnað, útsjónd og plasering. Avgjørt varð at kanna møguleikan at flyta nýggja verkið longur heim frá sjálvari byrgingini enn hvat mælt var til, og at kanna møguleikan at fáa meiri vatn í byrgingina í Villingadali.

Fyri at nevna tað síðsta fyrst, so er henda loysn sera kostnaðarmikil.

P/F Sofus M. Jakobsen, ráðgevandi verkfrøðingur, metir at ein ø200 mm tunnil boraður 1.200 m gjøgnum Gellingarklett fyri at koma vestur í Sundsá, vil kosta á.l. 6.000 x 1.200 = 7.2 mill. kr. + byrging um Sundsá, pumpuskipan og rørskipan niðan í tunnilin.

Verður ein rørleiðing løgd runt Gellingarklett vestur í Sundsá, verður kostnaðurin á.l. 5.000 x 2.500 = 12.5 mill. kr. + eykaarbeiðið.

Modell av nýggjum vatnverki, líkum tí í Villingadali, er gjørt av P/F Árna Winther, og er hóskandi pláss funnið, har fjarðstøða frá byrgingini er størri enn í fyrra tilmæli.

Eisini hevur P/F Sofus M. Jakobsen gjørt eina meira fullfíggjaða innrætting av verkinum.

Kostnaður av vatnverki, nýggjari kloakk og nýggjari vatnleiðing heim á Norðasta Horn er mett til kr. 57,5 mill. (íroknað 8,5 mió. kr. í projektering).

Árligar rakstrarútreiðslur eru mettar til kr. 320.000. Her er hugsað um olju, streym og kemikaliur v.m.

Danskt felag, Uniq Enviro er komið við einum tilboði uppá eitt alternativt vatnverk.

Í stuttum fevnir hetta tilboð um ein nýggjan reinsihátt, ið spakuliga er við at mennast. Talan er um membranfiltur, sum vatnið verður trýst ígjøgnum. Hesi membranfiltur eru so tøtt at sjálvt ikki bakteriur sleppa ígjøgnum.

Hetta seinna verkið tekur væl minni pláss enn tað fyrr nevnda, so her er møguleiki at byggja nýggjan bygning á fundament/kjallara sum er heimanfyri og fast í verandi vatnverk.

Kostnaður fyri hetta verk, bygning og leiðingar heim á Norðasta Horn er á leið kr. 45 mill.

Árligar rakstrarútreiðslur eru mettar til:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. Streymur | 570.000 kwh á kr. 0,99 + kr 5.280 | kr. | 570.000 |
| 2. Viðlíkahald, reinsing og eftirlitsvitjan | | - | 275.000 |
| 3. Aðrar útreiðslur | | - | 45.000 |
| 4. Nýggjar membrankasettir* | | - | 660.000 |
| Í alt | | kr. | 1.550.000 |

*Henda útreiðsla tekur fyrst við eftir 10 árum.

Fyrimunir við hesum verki í mun til hitt fyrr nevnda eru:
Minni íløga, skjótari at byggja og møguliga er hetta ein reinsiskipan, sum fer at mennast komandi ár og gerast alt meira vanlig.

Vansarnir eru - stóra rakstrarútreiðslan og óvissan hvussu verkið fer at roynast. Membranfiltrering er roynd í nøkur ár, men júst hetta modellið er so nýtt, at einki verk er uppsett enn.

Kunnað verður nærri um málið á fundinum. Eisini verður kunnað um tey reinsiverk í Oslo, ið umsitingin hevur kunnað seg um á heysti í fjør.

**Tilmæli:**
Víst verður til mannagongd í sambandi við verkætlanir, ið skulu fíggjast av konto fyri íløgur, har 'faknevnd vísir á tørv/hugskot og fígging' til eina verkætlan.

Havandi í huga góðu royndirnar av vatnverkinum í Villingadali, stóru rakstrarútreiðslurnar og óvissuna við nýggju membran-filtreringini og ta heildarmynd umsitingin hevur fingið av norskum vatnverkum á kunningartúrinum í oktober 2005 mæla leiðarin fyri vatn- og gøtuljósdeildina og býarverkfrøðingurin til, at arbeitt verður

víðari við projektuppskotinum hjá P/F Sofus M. Jakobsen, og at beina málið í fíggjarnevndina at viðgera ávísing til fígging.

**Tekniska nevnd 6. apríl 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2006:** Víst verður til notat, dagfest 18. apríl 2006, frá leiðaranum fyri vatn- og gøtuljósdeildini og býarverkfrøðinginum.

Samtykt at mæla býráðnum til, um teknisku nevnd, byggi- og býarskipanarnevndina og heilsu- og umhvørvisnevndina, at játta kr. 400.000,00 av íløgum til projektering og at velja bygginevnd.

**Býráðið 27. apríl 2006:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum frá Jan Christiansen um at beina málið aftur í nevnd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 1. mai 2006:** Nevndin samtykti at taka málið av skrá.

**Ískoyti:**
Ynski er, at nevndin tekur støðu til staðsetingina av reinsiverkinum. Umsitingin leggur fram uppskot til støðutakan.

**Tekniska nevnd 4. mai 2006**: Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Leivur Hansen og Høgni Mikkelsen, samtykti at taka undir við uppskoti nr. 1, har bygningurin til reinsiverkið verður staðsettur sum víst í notati, dagf. 3. mai 2006 (j.nr. 2004-0389/30).

Ein minniluti, Sjúrður Olsen og Katrin Dahl Jakobsen, mælir til at bygningurin verður staðsettur sambært uppskoti nr. 2 í sama notati.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 10. mai 2006:** Nevndin staðfesti samtyktina í teknisku nevnd frá 6. apríl 2006 og meirilutanum í teknisku nevnd frá 4. mai 2006.

**Ískoyti:**
Eftir ynski um nýtt vatnreinsiverk í Havnardali var byggiprogram gjørt og peningur játtaður til forprojekt og byggiskrá, og er hetta liðugt.

Tvey uppskot eru um staðseting av reinsiverki og eru bæði í 4. grundumráði.

Í fyrra uppskoti verður verkið lagt í gl. áarbotn upp at verandi verki og við hóskandi fjarstøðu frá byrgingini.

Hesum uppskoti taka tekniska- og heilsu & umhvørvisnevndin undir við.

Í seinna uppskoti verður verkið lagt einar 100 metrar longur heima og grivið/sprongt inn í skráan á atkomuvegnum.

Kunnandi fundur var 22. mai 2006 við býargartnara og lendisarkitekt.

Býarverkfrøðingurin og leiðarin fyri vatn- & gøtuljósdeildini mæla til at taka undir við fyrra uppskoti viðv. staðseting, og at neyðug frávik verða loyvd í byggisamtyktini fyri 4. grundumráði.

Hetta merkir, at serligt byggiloyvi má fáast, og at viðkomandi friðingarmyndugleikar koma inn í myndina.

Býarskipanardeildin og lendisdeildin meta, at bygningur við fyrimuni kann staðsetast niðanvert byrgingina sum ein hugmynd av einari frárenning/útlopi og við tí gevur virkseminum eitt meiri skilvíst og logiskt útlit.

Bygningurin eigur at knýtast saman við verandi bygningi, sum verður mettur at hava byggifrøðiligt monumentalt og varandi virði.

Verandi áarlega og áarbakki skulu varðveitast og umleggjast soleiðis, at hesi ikki hvørva í byggi- og lendisviðgerðini.

Mett verður tó eisini, at niðara staðsetingin tvørturum dalin, har bygningurin verður lagdur inn í lendið, eisini er ein góð bygnings-/lendisloysn. Henda loysn verður mett dýrari av tí, at størri lendisarbeiði skulu gerast áðrenn og aftaná bygging.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2006:** Samtykt at útseta málið til komandi fund.

**Fíggjarnevndin 31. mai 2006:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Býararkitekturin hevur verið á staðnum, og hevur sett sett seg inn í málið. Vísandi til gongdina í málinum, og leiklutin annars hjá býarskipanardeildini í sambandi við staðseting og bygging av bygningum í kommunalum høpi, skal metast um skilabestu loysnina, at bæði staðseta sniðgeva eina so týdningarmikla, og markanta bygging.

Av málinum framgongur, at 2 staðsetingar hava verið umrøddar, men er onnur staðsett av praktiskum og fíggjarligum orsøkum, meðan hin er eftir politiskum ynski um at kanna aðra staðseting. Báðar loysnirnar kunna lata seg gera og kunna væl arbeiðast fram til eina nøktandi loysn.

Havandi í huga at kommunan í fleiri førum hevur tilskilað sær rætt, og eisini gjørt brúk av hesum rætti, at tillaga verkætlanir í einum æstetiskum samanhangi, hevur kommunan eina skyldu at leggja seg eftir hesum í sínum egnu verkætlanum.

Hinvegin er einki til hindurs fyri, at staðsetingin og byggisniðið kann leggjast fyri á seinni fundi, tá hetta arbeiðið er gjørt, soleiðis at arbeiðast kann víðari við verkætlanini

sambært innanhýsis mannagongd fyri byggingar í Tórshavnar kommunu samtykt av býráðnum.

Ein slík samtykt vildi í hesum føri so gingið upp á at arbeiðast skal við eina staðseting í økinum, og sniðgeving av bygningi til endamálið at leggja fyri til politiska avgerð, meðan arbeitt verður víðari við málinum, soleiðis at býráðið kann taka principiella avgerð um farast skal víðari við verkætlanini út frá verandi tilfar um tekniskar loysnir og kostnað.

**Tilmæli:**
Grundað á hetta at økið sýnist at kunna húsa eina slíka stóra bygging, sum hóast alt er talan um, við sínum 18 x 60 metrum sambært tilfari í málinum, mælir býararkitekturin til, at umsitingin fær til vega skitsuuppskot, sum lýsir bæði staðseting og byggisnið vísandi til, at tað má metast sera umráðandi, at hesi viðurskifti eru loyst sum eina heildarloysn í einum so viðkvæmum umhvørvi, sum her er talan um.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 12. juni 2006:** Nevndin samtykti, at umsitingin fær til vega skitsuuppskot av báðum møguleikum viðvíkjandi staðseting og byggisniði at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti:**
Á fundi 12. juni 2006 var málið um nýtt vatnreinsiverk í Havnardali fyri í byggi- og býarskipanarnevndini.

Avgjørt varð, at umsitingin skuldi fáa tilfar til vega, ið greitt vísti, hvussu bygningurin kom at síggja út í lendinum, ávíkavist í tilmæli 1 og tilmæli 2.

Tekningar/myndir eru gjørdar í 3D, ið lúka hesi ynski,r.

Staðseting 1, ið er uppat verandi vatnverki er 20040389/36.
Staðseting 2, ið er løgd inn í skráan nakað heimari er 200400389/35.

Sambært býarverkfrøðinginum og leiðaranum fyri vatnverkið fyriliggur ongin kostnaðarmeting.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin og leiðarin fyri vatnverkinum meta, út frá verandi upplýsingum, at báðar staðsetingar eru javnt góðar.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at staðseting av bygningum verður sambært uppskoti 2, j. nr. 2004-0389/35.

**Ískoyti:**
24. juni 2006 hevur kommunustjórin fingið sms-boð frá leiðaranum fyri vatndeildina, sum er staddur uttanlands, har hann boðar frá, at hann metir, at loysn 2 helst verður tann bíligara loysnin, men tó verður tað ikki tann heilt stóri munurin.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. juni 2006:** Ein meiriluti, Jógvan Arge, Sjúrður Olsen og Bjarti Mohr, samtykti at taka undir við tilmælinum frá býararkitektinum.

Ein minniluti, Leivur Hansen, mælir til at taka undir meirilutanum í teknisku nevnd 4. mai 2006 og heilsu- og umhvørvisnevndini 10. mai 2006.

**Fíggjarnevndin 29. juni 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at játta kr. 400.000,00 av íløgum til projektering.

Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Jan Christiansen og Høgni Mikkelsen, samtykti eisini at mæla býráðnum til at taka undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini tann 28. juni 2006.

Ein minniluti, Leivur Hansen, vísir til støðu sína í byggi- og býarskipanarenvndini tann 28. juni 2006.

**Býráðið 29. juni 2006:** Fyrst var atkvøtt um broytingaruppskot hjá Hilduri Eyðunsdóttir, sum mælti til at játta kr. 400.000 til projektering, og at spurningurin um staðseting verður útsettur til nærri kanningar, sum fall við 4 atkvøðum fyri 7 ímóti.

Fyri atkvøddu: Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal og Elin Lindenskov.

Ímóti atkvøddu Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen, Jan Christiansen og Heðin Mortensen.

Greiddu ikki atkvøðu Jógvan Arge og Katrin Dahl Jacobsen.

Síðani var atkvøtt um tilmælið hjá meirilutanum í fíggjarnevndini, sum var samtykt við 10 atkvøðum fyri og 1 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Katrin Dahl Jakobsen, Elin Lindenskov, Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddi Leivur Hansen.

Greiddu ikki atkvøðu Hildur Eyðunsdóttir og Marin Katrina Frýdal.

**130/06** **2004-0214**

**Nýggjur fólkaskúli í Hoyvíkshaganum.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Tórshavnar kommuna hevur avgjørt at byggja nýggjan 2-sporaðan fólkaskúla við frítíðarskúla til 1.-9. flokk í Hoyvíkshaganum. Frítíðarskúlin skal hýsa 1. og 2. flokki.

Í heildarætlanini skal pláss leggjast av til svimjihyl, sum møguliga kemur seinni.

Eftir starvsskipanini hjá kommununi í byggimálum fær mentamáladeildin eina byggiskrá til vega. Henda byggiskrá verður síðani grundarlag undir útinning av verkætlanini, sum byggideildin hevur ábyrgdina av.

Endamálið við byggiskránni er:

at orða og samskipa tørv, ynski og krøv arbeiðsánarans
at útgreina, í hvønn mun tað ber til at ganga hesum tørvi, ynskjum og krøvum á møti
at vísa á prinsipployis nir á hesum grundarlagi

Við tí í huga at støðug menning og broyting er innan skúlaøkið, og at roknast kann við umskipaðum virksemi, tá nýggir karmar loyva hesum, er lítið sannlíkt, at tað ber til at gera eina neyva meting nú av, hvussu virksemið verður, tá ætlaða byggingin verður tikin í nýtslu. Tí er dentur lagdur á at skapa so víðar og broytiligar umstøður sum gjørligt til skúlan.

Arbeiðsbólkurin, ið hevur staðið fyri byggiskránni, hevur viðgjørt stakspurningar saman við fólki við serligum innliti, tá tað hevur verið mett neyðugt.

Byggiskráin er býtt upp í 4 partar:

1. Almennur partur
2. Námsfrøðiligur partur
3. Hølisskrá
4. Byggitøkni

**Grundøki**
Kommunan hevur lagt av eitt øki við Løgmannabreyt til skúlan. Víddin er sambært korti 17.600 m². Økið er ogn hjá Tórshavnar kommunu.

Støddin tykist hóskandi, tá hugsað verður um tørvin á byggilendi (nakað minni enn 5.000 m², tí bygt verður væntandi í meira enn einari hædd), fríøki (minst eini 10 m² fyri hvønn næming) og ferðslu (vegir, gøtur, bilpláss). Tá farið verður undir at gera byggiuppskot, má kortini metast um støddina við atliti til byggihátt, landslag og ferðslu.

**Kostnaður**
Bygningsstøddin er ásett av Tórshavnar kommunu. Støddin er grundað á eina bruttogólvvídd uppá 11 m² fyri hvønn næmingin. Afturat hesum kemur pláss til frítíðarskúla í 1. og 2. flokki, og pláss til skúlabarna-tannlækna.

Samlaða næmingatalið, tá skúlin er fult útbygdur, kann setast til eini 450. Tá er roknað við 18 flokkum við 25 næmingum.

Út frá hesum kann væntast, at samlaða gólvvíddin verður umleið 5.400 m².

**Kostnaðarkarmur**
Sum grundarlag undir framhaldandi ráðleggingini ber helst til at siga, at samlaða íløgan uttan meirvirðisgjald verður:

5.400 m² av gólvvídd fyri 5.400 m² x kr. 18.000 = 97,2 mill. kr.

Hetta má kortini metast sum ein vegleiðandi karmur, til støða er tikin til, hvussu byggiætlanin skal fremjast.

**Tíðarætlan**
Skotið verður upp, at skúlin skal byggjast í einum, men byggingin skal leggjast soleiðis til rættis, at yngstu flokkarnir sleppa í skúla skjótast gjørligt, og hinir so hvørt byggingin verður liðug.

Eftir tíðarætlanini verður allur skúlin liðugur á sumri 2006.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamáladeildarleiðarin mæla til at góðkenna fyriliggjandi byggiprogramm, at projektering verður sett í verk beinanvegin, og at peningur verður játtaður til hetta av íløguætlanini 2003 og 2004.

**Mentamálanevndin 16. september 2003:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og mentamáladeildarleiðaranum og leggja málið fyri býráðið.

Eisini samtykt at heita á plandeildina um at skipa soleiðis fyri, at yngstu flokkarnir sleppa í skúla í august 2005, og hinir flokkarnir so hvørt byggingin verður liðug.

**Býráðið 25. september 2003:** Einmælt samtykt at taka undir við mentamálanevndini við tí ískoyti, at málið verður lagt aftur fyri býráðið, tá dispositión og projektuppskot eru liðug.

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyri nevnda mæla tekniski stjórin og býararkitekturin til:

1) at verkætlanin verður gjørd í ”partnering”.

2) at projektuppskot verður gjørt at leggja fyri nevndina aftur til góðkenningar saman við kostnaðarmeting og cachflow.

3) at arbeiðið verður boðið út, tá projektuppskotið er gjørt, og at teir bjóðandi verða 3 entreprenørar, sum hava royndir innan partnering.

4) at ein treyt í útbjóðingartilfarinum verður, at teir bjóðandi í størsta mun skulu nýta føroyskar undirarbeiðstakarar.

5) at tilboðini, sum koma inn, verða løgd fyri nevndina aftur til støðutakan við tilmæli frá stýrisbólkinum.

6) at stýrisbólkurin verður mannaður soleiðis:
Eitt umboð fyri arbeiðsánaran,
Eitt umboð fyri arkitektin,
Eitt umboð fyri verkfr. (møguligt)
Eitt umboð fyri entreprenørin

7) at arkitektaráðgevi verður settur beinanvegin, og verkfrøðingaráðgevar tá tørvur er á tí.

8) at kommunan setur ein samskipara/skrivara í starv á planleggingardeildini í fulla tíð til burturav at taka sær av verkætlanini, og at hetta starv verður lýst leyst. Starvið skal verða tíðaravmarkað frá febr./mars 2004, til byggingin er liðug og avhendað.

9) at projektleiðari verður valdur av stýrisbólkinum, tá hesin, eftir útbjóðing hevur sett organisatiónina saman.

Umframt omanfyri nevnda mæla tekniski stjórin og býararkitekturin til, at mentamálanevndin tekur støðu til:

10) um ítróttarhøll ella fimleikahallirnar skulu gerast.

11) um graslíkisvøllur við rennibreyt, gummivøllur til rennufjalir og umstøður til nakað av frælsum ítrótti skal verða við í verkætlanini.

**Mentamálanevndin 19. november 2003:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá tekniska stjóranum og býararkitektinum, men spurningurin um útbjóðingarhátt verður viðgjørdur á einum seinni fundi.

Eisini samtykt at taka undir við, at ein dupult fimleikahøll verður gjørd og at taka undir við at graslíkisvøllur við rennibreyt, gummivøllur til rennifjalir og umstøður til nakað av frælsum ítrótti skal verða við í verkætlanini.

**Mentamálanevndin 3. desember 2003:** Samtykt at fara undir projekteringsarbeiðið beinanvegin og gera uppskot til arbeiðs- og tíðarætlan at leggja fyri nevndina á fyrsta fundi 2004.

Málið verður sent til byggideildina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin tekur støðu til hvønn av omanfyri nevndu møguleikum skal arbeiðast eftir.

**Mentamálanevndin 10. februar 2004:** Samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við uppskoti 2 at leggja fyri nevndina skjótast gjørligt og beina málið í byggideildina.

**Mentamálanevndin 3. mars 2004:** Samtykt at byggja ein skúlabygning við verandi Hoyvíkar skúla, sambr. støðumynd, dagfest 3. mars 2004, sum skal kunna hýsa yngstu flokkunum og frítíðarskúla.

Eisini samtykt at játta kr. 100.000,00 av íløgujáttanini 2004 til ger av dispositiónsuppskoti at leggja aftur fyri nevndina skjótast gjørligt, og beina málið til byggideildina.

**Ískoyti:**
Árni Winther, ark., hevur gjørt dispositiónsuppskot.

**1. Inngangur**

Tórshavnar kommuna hevur latið gera eina byggiskrá, sum lýsir ætlanina at byggja ein nýggjan skúla í Hoyvíkshaganum. Byggiskráin er í fýra pørtum og dagfest juni 2003. Byggiætlanin er síðani viðgjørd politiskt og námsfrøðiliga. Eftir ársskiftið varð arbeiðið at fáa til vega eitt skipanaruppskot sett í verk.

Stórur tørvur er á nýggjum skúla í økinum. Kortini hevur kommunan mett, at ein so stór verkætlan skal umhugsast gjølla, áðrenn farið verður undir bygningina. Tí verður arbeitt við at fáa skúlastovur tøkar við verandi Hoyvíkar skúla frá skúlaárinum 2005/2006 til yngstu flokkarnar. Hesir flyta so í nýggja skúla, tá hann er klárur at taka í nýtslu.

Ætlanin er at byggja nýggja skúlan so skjótt, hetta verkliga letur seg gera, og fíggjarorkan hjá Tórshavnar kommunu loyvir.

**2. Grundøki**

Í heildarætlanini fyri Hoyvíkshagan hevur Tórshavnar kommuna lagt eitt økið av til nýggjan fólkaskúla. Økið er eystan fyri Løgmannabreyt, niðan fyri innkoyringina til útstykkingina, ið nú er í gerð. Eystast er hagalendi við jøvnum halli suðureftir, í miðjuni eitt gil við einum hamarskapilsi upp frá eystureftir, og eystasti parturin er ein slætti við jøvnum halli suðureftir. Ein lítil graslíkisvøllur er inn frá Løgmannabreyt.

Á grannaøkinum eystanfyri er partur av ætlaðu miðstaðarbyggingini, sum gongur oman og niðan frá Vegnum Langa.

Samlaða støddin á økinum, sum er sett av til skúlan, er umleið 17.600 m².

**3. Innrættingin námsfrøðiliga**
Hølisskipanin byggir á tann partin av byggiskránni, ið lýsir námsfrøðiligu hugtøkini, sum skúlin skal virka eftir. Arbeiðsbólkurin, ið tilevnaði byggiskránna, hevur havt høvi at gera viðmerkingar, meðan arbeitt hevur verið við skipanaruppskotinum.

Grundhugsjónin er: "at byggiháttur og innrætting skúlans er fyriskipað soleiðis, at tað ber til at hava eina fjølbroytta undirvísing, ið verður lagað eftir tørvi og fortreytum næminganna."

Hølini eru av hesi orsøk ymisk í skapi, stødd, hædd, tilfari, litum og ljósi.

Flokkarnir hoyra til "heimsrustir", sum umfata:

- 1.-3. flokk við frítíðarskúla
- 4.-5. flokk
- 6.-7. flokk
- 8.-9. flokk

Serhøli er í fakdeplum, sum hava hvør sínar bygningskarmar, svarandi til ymiska tørvin.

**4. Lendisskipan**
Tilkoyring er skipað í samstarvi við vegaumsitingina soleiðis, at børn trygt kunnu verða sett av í lumma framvið Løgmannabreyt, og bilarnir fáa vent í komandi rundkoyring beint omanfyri.

Bilar, ið skulu steðga, koyra eysturum við tilkoyring frá nýggja miðstaðarøkinum har. Pláss er fyri umleið 60 parkeringsplássum. Økið eystanfyri er harumframt lagt av til ítróttarendamál.

Vestanfyri er góður sólargangur og møguleiki at skapa lívd, so her eru spælipláss og fríøki til næmingarnar. Sunnanfyri er útiøki uppat matarhøll, og skermað útiøki til yngstu næmingarnar í skúla og frítíðarskúla.

Í byggiskránni var kravt, at øki skal ávísast til eina nýggja svimjihøll. Mælt verður til, at henda verður partur av miðstaðarøkinum, sum liggur høgliga fyri hjá skúlanum og almenninginum, og kann brúka somu parkeringspláss, tá skúlin ikki er í nýtslu

**4. Umfatan**
Í byggiskránni grein 5.1 vóru nakrar metingar gjørdar um samlaðu gólvvíddina, grundaðar á ein karm uppá 11 m² fyri hvønn næming, ið Tórshavnar kommuna hevur

víst á. Samlaða støddin var út frá hesum sett til 5.400 m², har umleið 450 m² vóru til heilsurøkt og frítíðarskúla.

Eisini var í hesi grein í byggiskránni sagt: "*So hvørt byggiætlanin gerst meira ítøkilig, verður mett um, hvussu støddarkarmurin hóskar.*"

Í skipanaruppskotinum eru ynski og krøv til innrætting samanfatað í eini ítøkiligari byggiætlan, har hvør einstøk funktión er vigað eftir námsfrøði, bygging og stødd/kostnaði.

Fyri at halda støddarkarmin, eru nakrar raðfestingar gjørdar í byggiskránni.

Mett verður, at heimaøkini ikki kunnu gerast munandi minni um námsfrøðiliga grundhugsanin ikki skal fara fyri skeyti. Somuleiðis er støddin á flestu fakhølum á markinum til tað sum krevst.

Hinvegin er økið til ítrótt minkað samanborið við ásetingarnar í byggiskránni, har ynski varð tvær hallir nakað størri enn vanligar himleikahallir, umframt pláss til amboð, neyðug skiftirúm o.a.

Orsøkin til hesa minking er partvís, at ítróttarøki er sera plásskrevjandi fyri hvønn næming, og partvís tí, at á donsku skúlunum, ið bygdir eru sambært somu fortreytunum, er eitt ikki so stórt multirúm til ítrótt, ístaðin fyri eina ella fleiri fimleikahallir/ítróttarhallir.

Hølisyvirlit:

| | |
| --- | --- |
| Heimrustir | 2.141 m² |
| av hesum frítíðarskúli | 237 m² |
| Felagsøki og fyrisiting | 1.608 m² |
| Ítróttur | 685 m² |
| Fakdeplar | 890 m² |
| Heilsurøkt | 126 m² |
| Bruttostødd tilsamans | 5.450 m² |

**4. Byggitøkni**

Sum grundarlag undir byggiháttinum eru hesar fortreytir valdar:

- Tað er av stórum týdningi, at tilfar og konstruktiónir tola ætlaðu nýtsluna. Hetta hevur týdning bæði fyri at skúlin ikki alt fyri eitt sær slitin út, so næmingarnir ikki virða bygningskarmarnar, og fyri at viðlíkahaldið ikki skal gerast ov stórt.
- Fyri at avmarka íløguna mest møguligt, verða einfaldar loysnir valdar, allastaðni har tað ber til.

Vit ímynda okkum lættar konstruktiónir, helst úr stáli og timbri, við neyðugum stoyptum konstruktiónum. Bygningsskapið ger, at tryggar loysnir kunnu veljast til at fáa tett móti avfalli og vindi.

Støða er ikki tikin til uttandura klæðing av veggjum og tekju. Tilfarið skal tola veðurlag og slit av nýtsluni, og avmarka viðlíkahaldið. Skilaveggir úr plátum við neyðugari styrki og ljóðdoyving. Loftini eru klødd við ljóðdoyvandi gipsplátum. Gólv løgd við t.d. linoleum, í duri flísar. Innhurðar við massivum hurðabløðum.

Roknað er við, at heimrustir, heilsurøkt og verkstaðsbygningur verða sjálvstøðugar brunaeindir í eini hædd við rýmingarleiðum beinleiðis út í lendið. Hetta er mest einfalda loysnin. Brunatrygd í felagsøkjum skal tryggjast eftir samráðing við myndugleikarnar við atliti til nýtslumøguleikar og kostnað.

Hóast ongi lógarfest krøv eru, verður mælt til, at rørslutarnað fáa brúkt skúlan. Hetta er gjørligt við vístu skráunum og lyftu.

Krøvini til inniklima eru lógarfest. Sambært reglunum skal mekaniskt luftskifti verða í nýggjum skúlum. Tó ber til at víkja frá hesum, um tað er sannlíkt, at inniluftin verður nóg góð við øðrum tiltøkum. Við okkara royndum á økinum mæla vit til, at loftshæddin verður stór og teldustýrt natúrligt luftskifti tryggjað. Fortreytin fyri, at hetta riggar er, at sólskermingin er munagóð.

Roknað er við fjarhita. Mælt verður til at kanna, um tað loysir seg at brúka tekjuna til orkuískoyti við sólorku.

Bygningurin skal fyrireikast til tráðleysa samskiftisútgerð.

**<u>5. Tíðarætlan</u>**

Verkætlanin verður útint við støði í tíðarætlan, *Fylgiskjal 2*, til byggiskránna. Staðfestast kann, at fyrireikingararbeiðið viðvíkjandi uppskotsstiginum ikki varð klárt at byrja sum ætlað, og at tað hevur tikið drúgvari tíð enn mett. Kortini forðar hetta ikki fyri, at komandi arbeiði verður gjørt innanfyri tey ætlaðu tíðarskeiðini frá nú at rokna.

Tá støða er tikin til, hvussu skúlin verður tikin í nýtslu, og tá greitt er, hvussu íløgukarmurin fyri hesa bygging sær út í mun til heildarkarmin hjá kommununi, verður tíðarætlanin endurskoðað.

**<u>6. Kostnaður</u>**

Verður metingin í byggiskránni (grein 5.2.) endurskoðað við somu fortreytum (m.a. príslegu várið 2003), við støði í støddini sambært *4. Umfatan* verður úrslitið:

**5.450 m$^2$ av gólvvídd fyri kr. 18.000 = 98,1 mill kr.**

Ein meira nágreinilig meting, sum byggir á veruligar nøgdir sambært hesi verkætlan, skal gerast í næsta arbeiðsstiginum, tá yvirskipað støða er tikin til bygningskonstruktiónir og –innleggingar.

**Víddin økjast**
Skal samtyktin í mentamálanevndini uppfyllast um, at skúlin skal innihalda eina dupulta fimleikahøll, má víddin økjast við 175 fermetrum.

Meirkostnaðurin fyri hesar fermetrarnar er 3,2 milliónir krónur, roknað út frá somu fortreytum sum samlaða kostnaðarmetingin.

Heildarætlanin verður ikki ávirka annars av hesi øking.

Árni Winther, arkitektur, kemur at greiða frá uppskotinum.

**Mentamálanevndin 30. juni 2004:** Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at góðkenna skipanaruppskotið frá mai 2004, tó við tí broyting at ein dupult fimleikahøll verður gjørd, sum krevur umleið 175 m² afturat, og at høli til tannlækna og heilsukanningar verður víðkað við umleið 50 m².

**Fíggjarnevndin 19. august 2004:** Samtykt mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 2. september 2004:** Ein minniluti, Høgni Mikkelsen, mælir til at taka undir við tilmælinum um at byggja nýggjan fólkaskúla í Hoyvíkshaganum tó við teirri broyting, at ásetingin, um at skúlin bert skal fevna um 1. til 9. flokk, verður tikin burtur. Í staðin fyri verður mælt til at beina málið aftur í mentamálanevndina til nýggja viðgerð og støðutakan til, um ikki skúli eigur at vera fyri næmingum í 1. til 10. flokki í Hoyvíkshaganum.

Atkvøtt var um kravið frá Heðini Mortensen um at beina málið aftur í mentamálanevndina, sum var samtykt við 6-2 atkvøðum.

Fyri atkvøddu Jan Christiansen, Heðin Mortensen, Schumann Hjaltalin, Sjúrður Olsen, Beate L. Samuelsen og Jákup S. Joensen. Ìmóti atkvøddu Leivur Hansen og Elin Lindenskov.

**Ískoyti:**
Býráðið samtykti á fundi 25. september 2003 at taka undir við mentamálanevndini, at kommunan fór at byggja nýggjan 2-sporaðan fólkaskúla við frítíðarskúla til 1.-9. flokk í Hoyvíkshaganum.

Grundarlagið undir samtyktini var, at mentamálanevndin á fundi 25. september 2002 samtykti, at skúlin við Løgmannabreyt verður ein 2-sporaður skúli frá 1.-9. flokk, og at núverandi Hoyvíkar skúli verður ein 2-sporaður skúli frá 1.-9. flokk.

Somuleiðis varð samtykt, at 10. flokkarnir fara oman í Eysturskúlan. Eisini fara næmingarnir í Kollafirði í 8. og 9. fl. at vera í skúlanum í Kollafirði.

Í sambandi við avgerðina um at hava framhaldsdeild í Hoyvík og Kollafirði verða skúlastovur tøkar á Eysturskúlanum, sum gevur møguleikar at víðka og menna samstarvið í 10. flokkunum. Næmingarnir úr Hoyvík, Kaldbak og Kollafirði fara at ganga í 10. flokki á Eysturskúlanum, men talan kann eisini verða um at víðka samstarvið at fevna um aðrar skúlar.

Í skrivi, dagfest 6. apríl 2004, frá Mentamálaráðnum til Tórshavnar kommunu um 10. flokk sigur Mentamálaráðið m.a.

”Ráðleggingarnevnd Fólkaskúlans, ið skrivaði Álit um nýggja fólkaskúlalóg í 1997, sum er grundarlagið undir verandi fólkaskúlalóg, hevur m.a. víst á, at tað hevði helst verið best, um teir uml. 600 næmingarnir í 10. flokkunum í Føroyum høvdu verið savnaði í ein ella tveir fólkaskúlar, tí bert á tann hátt hevði tann einstaki næmingurin í størst møguligan mun fingið síni lærugreinaynski uppfylt. Ætlanin við at 10. flokkur skuldi verða heilt valfríur, var júst tann, at tann einstaki næmingurin skuldi í nógv størri mun enn áður kunna seta sína egnu útbúgving saman. Skal hetta eydnast er neyðugt við stórum skúlaeindum, antin sum skúlasamstarv ella við at savna allar 10. floks næmingarnar í Tórshavnar kommunu í einum stórum skúla.”

Byggideildin hevur kannað, hvat meirkostnaðurin verður, um ynski er at taka tríggjar 10. flokkar við í verkætlanina.

Sambært teimum fortreytum, sum higartil eru nýttar at meta um kostnaðar-karmin, sær ein øking soleiðis út sambært arkitektavirkinum Árni Winther:

Øking av víddini: 75 næm. * 11 m² pr. næm. = 825 m²

Meirkostnaður: 825 m² * 18.000 pr. m² = 14.85 mill. kr.
Vit gera vart við, at hesin kostnaður má metast sum ein grundíløga til at hýsa 75 næmingum afturat. Vit hava ikki kannað serstøk krøv til 10. flokkar, heldur ikki hava vit verið í samband við arbeiðsbólkin hjá byggiharranum hesum viðvíkjandi.

Um ein so stór øking/broyting í verkætlanini skal gjøgnumførast, er sjálvsagt, at vit eiga at endurskoða skipanaruppskotið frá mai 2004.

Í skúlaárinum 2004/2005 eru 186 næmingar í 10. fl. Tað eru 26 næmingar (ein fl.) færri enn síðsta skúlaár.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at halda fram við upprunaligu ætlanunum at byggja nýggjan 2-sporaðan skúla við Løgmannabreyt til 1.–9. flokk og frítíðarskúla til 1. og 2. flokk vísandi til:

at fólkaskúlalógin frá 1997 mælir til størri skúlaeindir í 10. flokkunum, sum mentamálaráðið eisini mælir til.
at skúlastovur verða tøkar í Eysturskúlanum, tá ið næmingarnir í 8. og 9. flokki í Hoyvík og í Kollafirði í framtíðini ikki koma at ganga har.
at meirkostnaðurin verður umleið 15 mill. kr. um 10. flokkur verður við verkætlanini.
at neyðugt verður at endurskoða alt skúlaprojektið, sum aftur fer at hava við sær, at verkætlanin dregur út.

**Mentamálanevndin 6. oktober 2004:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 7. oktober 2004:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndina.

**Býráðið 21. oktober 2004:** Ein minniluti, Høgni Mikkelsen, tekur undir við byggiætlanini, men mælir til, at pláss eisini verður fyri 10. flokki.

Fyrst var atkvøtt um minnilutatilmæli hjá Høgna Mikkelsen sum fall við 1 atkvøðum fyri og 10 atkvøðum ímóti. Fyri atkvøddi Høgni Mikkelsen. Ímóti atkvøddu Jan Christiansen, Heðin Mortensen, Jákup S. Joensen, Sjúrður Olsen, Beate L. Samuelsen, Tórfinn Smith, Elin Lindenskov, Hildur Eyðunsdóttir, Jógvan Arge og Leivur Hansen. Bjarti Mohr greiddi ikki atkvøðu.

Síðani var atkvøtt um tilmæli hjá Mentamálanevndini tann 30. juni 2004 sum var einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2005:** Árni Winther, arkitektur og Palli Henriksen, samskipari, kunnaðu um málið.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um kostnaðin av skúlanum

**Mentamálanevndin 24. mai 2006:** Bygginevndin kunnaði um kostnaðarmetingina, og hvussu langt arbeiðið er komið.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at byggibúna økið var boðið út í innbodnari lisitatión millum 5 fyritøkur. 4 fyritøkur valdu at geva tilboð.

Tilboðini eru (uttan mvg):

| | |
|---|---|
| Articon | kr. 8.656.258,00 |
| H.V. Lútzen P/F | kr. 8.710.130,00 |
| P/F J. & K. Petersen | kr. 7.862.666,35 |
| Samtakið TH & ZRJ | kr. 7.067.578,00 |

Árni Winther, arkitektar, hava saman við Landsbyggifelagnum og Sofus M. Jacobsen kannað og eftirroknað tilboðini. Hesir meta samlaðu tilboðshæddina sum lága, men forsvarliga. Kostnaðarmetingin segði kr. 7.885.160,00.

Til kunningar verður sagt frá, at bygginevndin hevur samtykt at bjóða arbeiðið við skúlan út í tveimum umførum afturat: Rábygningur fyri seg og liðugtgeran fyri seg. Hetta verður gjørt fyri at fáa skúlan lidnan til tíðina, t.v.s., at projekteringin kann halda fram, sjálvt um spakin er settur í.

**Tilmæli**
Bygginevndin mælir til at taka av lægsta tilboði áljóðandi kr. 7.067.578,00 frá Samtakinum TH (Tórhallur Hansen) & ZRJ (Zacharias R. Jacobsen) og játtað kr. 8.500.000,00 til arbeiðið, íroknað ókent 10%, byggileiðsla, eftirlit og mvg 6,25%.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2006:** Miðfyrisitingarstjórin var á fundinum og greiddi frá málinum.

Samtykt at mæla býráðnum til, um mentamálanevndina, at taka undir til tilmælinum frá bygginevndini.

**Mentamálanevndin 26. juni 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá bygginevndini um at taka av lægsta tilboðnum áljóðandi kr. 7.067.578,00 frá Samtakinum TH (Tórhallur Hansen) & ZRJ (Zacharias R. Jacobsen) og játta kr. 8.500.000,00 til arbeiðið, íroknað ókent 10%, byggileiðsla, eftirlit og mvg 6,25% og beina málið í býráðið.

Nevndin harmast um at røtt mannagongd ikki er brúkt.

**Býráðið 29. juni 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**131/06** **2004-2103**

**Barnagarður og vøggustova í Nólsoy - sólorkuskipanin.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Tórshavnar kommuna hevur í sáttmálanum um samanlegging við Nólsoyar kommunu viðtikið at gera ein dagstovn í Nólsoy.

Í Nólsoy er øki sett av til dagstovn, sum skal rúma eini vøggustovu, einum barnagarði og eini frítíðarstovu. Ætlanin er, at hesin stovnur skal standa liðugur um tíðarskeiðið primo 2006. Samlaða barnatalið verður 32 børn í vøggustovu og barnagarði pluss 10 børn í frítíðarskúlan sambært byggiprogramminum. Dagstovnurin verður 437 m² brutto til støddar, og gevur hetta eitt fermetratal, sum er áleið 10 m² fyri hvørt barnið.

Økið er partvíst byggibúgvið.

Samlaði kostnaður verður uml. 6.992.000,00 kr., um roknað verður við 16.000 kr./m². Tað svarar til 6.580.705,88 kr., tá ið 6,25% í MVG verður drigið frá.

**Tilmæli:**
Byggideildin mælir til, at stovnurin verður bjóðaður út í umvendari licitatión, har samlaði prísurin fyri dagstovnin er fastur aljóðandi 6.992.000,00 kr. svarandi til ein prís uppá 16.000 kr./m² við MVG á 6,25%.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 2.000.000 av íløgujáttanini á barnaansingarøkinum 2005 til útbjóðing í umvendari licitatión, og at restupphæddin, kr. 4.500.000, verða settar av á íløguætlanini 2006.

**Nólsoyarnevndin 1. februar 2005:** Nevndin mælir til at taka undir við trivnaðarstjóranum og mentamálaleiðaranum.

**Mentamálanevndin 2. februar 2005:** Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at taka undir við tilmælinum, tó við teirri broyting, at rúm skal verða fyri 4 barnagarðsbørnum afturat fyri sama kostnað. Boðið verður út í almennari heildararbeiðstøku.

**Fíggjarnevndin 9. februar 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 17. februar 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Byggideildin hevur fingið eitt tilboð fra Batec Sólhitaskipanir uppá uppsetan av sólhitaskipan á barnagarðurin í Nólsoy. Prísurin er 238.887,75 kr. uttan mvg. fyri tilfar, uppsetan og royndarkoyring soleiðis at skipanin er klár at taka í nýtslu, tá íð stovnurin letur upp. Afturat kemur ein eykakostnaður uppá 30.000 kr. til byggimeistaran í sambandi við eykaútreiðslur til íbinding í ætlaði hitaskipanin. Soleiðis verður samlaða útreiðslan 285.693,23 kr.v.6,25 % mvg.

Sambært útrokning grundað á ljósinnstráling í Føroyum verður sparingin millum 85 og 100 l av oliu pr. $m^2$ sólpanel pr. ár svarandi til 25.200 kr. um árið við núverandi oliuprísum. Sparingin í $CO_2$ útlat eru millum 11.718 og 13.000 kg.$CO_2$ pr ár.

Skipanin hevur eina livitíð uppá í minsta lagi 30 ár. Íløgan er, við núverandi oliuprísum vunnið inn aftur eftir 9,5 ár.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla til at játta 285.693,23 kr. til uppsetan av sólorkuskipan á barnagarðurin í Nólsoy av íløgum til barnagarðsøkið.

**Mentamálanevndin 26. juni 2006:** Michael Jacobæus greiddi frá málinum.

Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og leiðaranum fyri barna- og ungdómsdeildini at játta kr. 285.694,00 og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

Eisini samtykt at senda málið í nólsoyarnevndina til kunningar.

**Fíggjarnevndin 29. juni 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 29. juni 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**132/06** **<u>2004-2103</u>**

**<u>Barnagarður og vøggustova í Nólsoy - innbúgv</u>.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Tórshavnar kommuna hevur í sáttmálanum um samanlegging við Nólsoyar kommunu viðtikið at gera ein dagstovn í Nólsoy.

Í Nólsoy er øki sett av til dagstovn, sum skal rúma eini vøggustovu, einum barnagarði og eini frítíðarstovu. Ætlanin er, at hesin stovnur skal standa liðugur um tíðarskeiðið primo 2006. Samlaða barnatalið verður 32 børn í vøggustovu og barnagarði pluss 10 børn í frítíðarskúlan sambært byggiprogramminum. Dagstovnurin verður 437 m² brutto til støddar, og gevur hetta eitt fermetratal, sum er áleið 10 m² fyri hvørt barnið.

Økið er partvíst byggibúgvið.

Samlaði kostnaður verður uml. 6.992.000,00 kr., um roknað verður við 16.000 kr./m². Tað svarar til 6.580.705,88 kr., tá ið 6,25% í MVG verður drigið frá.

**Tilmæli:**
Byggideildin mælir til, at stovnurin verður bjóðaður út í umvendari licitatión, har samlaði prísurin fyri dagstovnin er fastur aljóðandi 6.992.000,00 kr. svarandi til ein prís uppá 16.000 kr./m² við MVG á 6,25%.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 2.000.000 av íløgujáttanini á barnaansingarøkinum 2005 til útbjóðing í umvendari licitatión, og at restupphæddin, kr. 4.500.000, verða settar av á íløguætlanini 2006.

**Nólsoyarnevndin 1. februar 2005:** Nevndin mælir til at taka undir við trivnaðar-stjóranum og mentamálaleiðaranum.

**Mentamálanevndin 2. februar 2005:** Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at taka undir við tilmælinum, tó við teirri broyting, at rúm skal verða fyri 4 barnagarðsbørnum afturat fyri sama kostnað. Boðið verður út í almennari heildar-arbeiðstøku.

**Fíggjarnevndin 9. februar 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 17. februar 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Sambært tilmæli frá byggideildini var avsett ein samlaður prísur 6.992.000,- kr. til bygging av dagstovni inkl. innbúgv. Játtað var 6.500.000 kr. til bygging av stovninum. Til innbúgv í dagstovninum í Nólsoy vænta soleiðis 499.200,- kr.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla til at játta kr. 499.200,- til innbúgv í dagstovuninum í Nólsoy av íløgum til barnagarðsøkið.

**Mentamálanevndin 26. juni 2006:** Michael Jacobæus greiddi frá málinum.

Samtykt at taka undir við tilmælinum at játta kr. 499.200,00 og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 29. juni 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 29. juni 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**133/06** **2004-0842**

**Fríðtíðarskúli og skúli til Hoyvíkar skúla**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Byggideildin hevur fingið til vega dispositiónsuppskot av skúla og frítíðarskúla til 1. og 2. flokk til Hoyvíkar skúla. Skúlin og frítíðarskúlin er 2-sporaður til umleið 96 børn. Hjálagt j. nr. 200400823.

Bygningurin verður tilsamans 710 $m^2$ til støddar.
Grundvíddin verður 410 $m^2$

Í sambandi við mál nr. 200300215 – Nýggjur fólkaskúli í Hoyvíkshaganum – hevur mentamálanevndin 3. mars 2004 samtykt at byggja ein skúlabygning við verandi Hoyvíkar skúla, sbrt. støðumynd, dagfest 3. mars 2004, sum skal kunna hýsa yngstu flokkunum og frítíðarskúla, og samtykt at játta kr. 100.000,00 av íløgujáttanini 2004 til gerð av dispositiónsuppskoti at leggja aftur fyri nevndina skjótast gjørligt, og beina málið til byggideildina.

Við einum $m^2$ uppá kr.15.265 verður samlaði kostnaðurin íroknað 6,25% mvg mettur at verða kr. 10.837.903.

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at góðkenna dispositiónsuppskotið við tíðarætlan, dagfest 25. juni 2004. Tað ber til at forcera tíðarætlanina til skúlabyrjan, men tað hevur ein meirkostnað við sær.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og deildarleiðarin í mentamálum mæla til at taka undir við tekniska stjóranum og býararkitektinum

Eisini verður mælt til, at kr. 2.150.000 verða játtaðar av íløguætlanini fyri 2004 og kr. 8.700.000 av íløguætlanini fyri 2005.

**Mentamálanevndin 7. september 2004:** Nevndin samtykti at taka undir tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og deildarleiðaranum í mentamálum og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið til samtyktar.

**Fíggjarnevndin 16. september 2004:** Samtykt at leggja málið fyri býráðið.

**Býráðið 23. september 2004:** Atkvøtt varð um tilmælið frá mentamálanevndini 7. september 2004, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Jan Christiansen, Jákup Suni Joensen, Høgni Mikkelsen, Bjarti Mohr, Tórfinn Smith, Elin Lindenskov, Hildur Eyðunsdóttir, Jógvan Arge og Leivur Hansen.

Greiddi ikki atkvøðu: Schumann Hjaltalin og Sjúrður Olsen.

**Ískoyti:**
Jørð- og kloakk arbeiði varð boðið út í desember 2004 sum undirhondsboð. 2 tilboð komu inn, og vóru tey:

1. Andrias Berg SpF kr. 614.120,- uttan MVG
2. P/F Maskinkoyring kr. 751.206,- uttan MVG

Bygginevndin mælir til at taka av tilboðnum frá Andrias Berg SpF.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka av tilboðnum frá Andrias Berg uppá kr. 652.502,50 við MVG, sum verður tikið av íløgujáttaninum á skúlaøkinum 2004.

**Mentamálanevndin 17. februar 2004:** Selmar Nielsen, arkitektur, greiddi frá projektinum.

Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, at taka av tilboðnum frá Andriasi Berg sp/f uppá kr. 652.502,50 við mvg, sum verður tikið av íløgujáttanini á skúlaøkinum 2004.

**Fíggjarnevndin 19. januar 2005:** Mikael Viderø, býararkitektur, og Unnie Justinussen, ark., vóru á fundinum og greiddu frá málinum.

Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 27. januar 2005**: Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Katrin Dahl Jakobsen, Elin Lindenskov Beate L. Samuelsen, Høgni Mikkelsen, Jan Christiansen, Bjarti Mohr og Annika Olsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Marin Kathrina Frýdal og Sjúrður Olsen.

**Ískoyti:**
Lisitatión av høvuðsarbeiðstøkuni var mánadagin 14. mars 2005. Inn komu 4 tilboð:

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Sp/f ÁTS v/ Karstin Vang, | kr. 7.190.787,00 |
| 2. | Sp/f Valbjørn Dalsgarð | kr. 7.498.611,00 |
| 3. | Articon | kr. 7.982.246,73 |
| 4. | MT – Højgaard | kr. 10.264.129,00 |

Bygginevndin mælir til at taka av tilboðnum frá sp/f ÁTS v/ Karstin Vang.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og at leggja málið fyri býráðið um fíggjarnevndina. Peningur er játtaður á íløguætlanini á skúlaøkinum 2004 og 2005 (býráðssamtykt 23. sept. 2004).

**Mentamálanevndin 6. apríl 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 13. apríl 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 21. apríl 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**

**Innbúgv til frítíðarskúlan:**
Ætlanin var at frítíðarskúlin í Stoffalág 60 skuldi lata aftur og innbúgvið flytast niðan í frítíðarskúlan í Hoyvík, men av tí at frítíðarskúlin í Stoffalág 60 heldur áfram, verður neyðugt at keypa nýtt innbúgv.

**Økið uttanum frítíðarskúlan:**
Arbeiðsbólkurin fyri nýggja barna- og frítíðarskúlan við Hoyvíkar skúla vil við hesum heita á mentamálanevndina um at játta kr. 375.000,00 kr. at gera uttanumøkið við nýggja skúlan.

Uttanumøkið var við í útbjóðingartilfarinum, men tá ið tilboðini komu inn var tað ov høgt í mun til kostnaðarmetingina. Tí varð hesin partur av veitingini tikin burtur úr.

Fyri at byggja nýggja skúlan varð neyðugt at broyta atkomuviðurskiftini til verandi skúla og Hoyvíkshøllina. Tað er m.a. hetta arbeiði, ið nú skal gerast aftur.

Viðmerkjast skal, at skúlin stendur við høvuðsinnkoyringina til skúlan og dygst við Vegin Langa, har nógv og tung ferðsla er. Neyðugt er tí at hugsa um ferðslutrygdina, og at økið er trygt hjá børnunum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla til at játta kr. 75.000,00 til innbúgv til frítíðarskúlan í Hoyvík og kr. 375.000,00 til økið uttanum frítíðarskúlan av íløgum á barnaansingarøkinum.

**Mentamálanevndin 26. juni 2006:** Unnie Justinussen greiddi frá málinum um økið uttan um frítíðarskúlan, og Frígerð Sundskarð greiddi frá málinum um innbúgv til frítíðarskúlan í Hoyvík.

Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Birgith Arge, skúlastjóri, kemur at greiða frá.

**Fíggjarnevndin 29. juni 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við menta-málanevndini.

**Býráðið 29. juni 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**FUNDUR LOKIN KL. 19.25**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Leivur Hansen | Hildur Eyðunsdóttir |
| Marin Katrina Frýdal | Katrin Dahl Jakobsen | Elin Lindenskov |
| Annika Olsen | Bjarti Mohr | Beate L. Samuelsen |
| Sjúrður Olsen | Høgni Mikkelsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |